## DAGSINS MEINING

# Fjølmiðlaábyrgdarlóg – eitt neyðugt tiltak

Pressufrælsið ella talu- og skrivifrælsið er sera aktuelt í hesum døgum og sjáldan hevur hetta fyribrigdið fingið so drúgva umrøðu í fjølmiðlunum og í politisku skipanini sum seinasta mánaðin. Orsøkin er sum øllum kunnugt tekningarnar í Jyllandsposten, sum hava elvt til mikla øsing í muslimska heiminum og í muslimsku umhvørvunum í Europa.

Pressufrælsið er frælsi undir ábyrgd. Hetta er endurtikið í tað óendaliga, men hetta er kortini ein standandi trupulleiki. Hóast vit hava pressufrælsi, merkir hetta sjálvsagt ikki, at ein kann skriva ella senda líkt og ólíkt um t.d. persónar. Revsilógin ásetir revsing fyri ærumeiðing alt eftir, hvussu grov hendan er. Er so als ikki tørvur á fjølmiðlaábyrgdarlóg? Hví skulu vit so yvirhøvur hava eina fjølmiðlaábyrgdarlóg? Er ikki nóg mikið við revsilógini, tá nú pressufrælsið er staðfest í grundlógini? Soleiðis ofta spurt í hesum døgum, og ein skilir væl, at fólk eru eitt sindur ørkymlað og spyrja, um ikki pressufrælsið verður skert við eini fjølmiðlaábyrgdarlóg.

Pressufrælsið verður á ongan hátt skert við eini fjølmiðlaábyrgdarlóg. Í einum fólkaræðiligum samfelag við fullum pressufrælsi slepst ikki undan mistøkum. Tað er tí sera umráðandi at tryggja, at mistøk, sum pressan ger, verða rættað – og at tey eru so avmarkað sum tilber. Tað er umráðandi, at er ein miðil t.d. við sínum tíðindaflutningi komin fyri at bera skeiv tíðindi um ein persón, so má hesin persónur hava lógartryggjaðan rætt at fáa hesi skeivu tíðindi rættað. Kærast kann til eina fjølmiðlanevnd, ið tekur støðu til, hvørt talan er um skeivan pressuetiskan atburð. Hetta hevur týdning fyri almenningin. Men enn størri týdning hevur tað, at fjølmiðlanevnd eggjar pressuni til at vera ansin og at hava allar heimildir í lagi. Ein slík etisk nevnd hevur avgjørt eina góða ávirkan og ger ivaleyst sítt til, at fjølmiðlafólk fara at vanda sær enn meira um sítt arbeiði í framtíðini. Fjølmiðlaábyrgdarlógin er tí eitt neyðugt tiltak og vit mugu tí vóna, at hon verður samtykt við teimum broytingum, sum kunnu koma millum 1. og 2. viðgerð í hesi tingsetu.

Slík skipan eigur tó á ongan hátt frá aðrari síðu at uppfatast ella brúkast til at skerja vanliga skrivi – og talufrælsið undir ábyrgd. Fjølmiðlar mugu framhaldandi kunna arbeiða frælst og frítt uttan uppílegging frá løggevandi ella útinnandi valdinum. Tað er so heldur ikki hetta, sum nýggja skipanin leggur upp til. Endamálið við skipanini er tvørturímóti at kunna skapa størri trúvirði mótvegis pressuni millum manna og skapa størri virðing fyri tí neyðuga handverki, sum pressufólk útinna. Men til tess at røkka hesum setningi eigur eitt nú persónliga útspillingin og yvirvinningin fyri øðrum, sum tíverri kemur fyri, at lúkast úr fjølmiðlunum. Her eiga allir fjølmiðlar og tey góðu fólk har virka at taka í egnan barm men eisini taka hendur saman og gera sítt til at ávirka gongdina og menningina tann rætta vegin. Latið okkum tí meta nýggju skipanina sum eitt hent og gott arbeiðsamboð, ið aftur kann stuðla okkum í at útinna journalistsiska handverkið fullgott og til fulnar. Nýggja skipanin skal vera við til at byggja brýr millum fjølmiðlar og brúkara.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rættleiðing til Ólav Rasmussen

**KIM SIMONSEN**



Herfyri skrivaði Ólavur Rasmussen svar til eitt ummæli, ið eg hevði í Kultura í ÚF. Hann tekur eini tvey ting fram, ið eg fanst at, men eg haldi ikki, at Ólavur fyriheldur seg til meginatfinningina í ummælinum, ið var, at Ólavur ikki hevur ein keldulista, tí er ógjørligt at siga, nær hann siterar onkran annan, sum t. d. Sløk um Kierkegaard. Ikki tí, øll fakfólk brúka keldur, hetta ger tannlæknin, professarin og bankamaðurin, tí just tað at vera ein fakmaður í einum akademiskum faki, er at kunna fyrihalda seg kritiskt og tulkandi til primerar og sekunderar keldur, hetta skilir legmaðurin ikki og heldur, at akademikarar antin duga gand, ella bert stoyta endurgevingar niður á pappír.

Eg meti tað sum ringa siðvenju ikki at uppgeva keldurnar ávegis, tí so havi eg ongan livandi kjans at meta (tí meti eg sum ummælari, at bókini vantar just hetta) um tað sum verður sagt.

Ólavur sigur: »Kim Simonsen kann fara út á Landsbókasavnið og lesa Tingakross, árgangirnar 1914 – 16, har Victor Danielsen citerar brot fyri brot úr Eygnabragdinum hjá Kierkegaard.« Tað er ikki meiningin, at eg sum lesari ella ummælari fyri Útvarp Føroya skal út á Landsbókasavnið at lesa Tingakross frá 1914-1916 sjálvur. Keldurnar burdu verið viðrørdar og verið endurgivnar í brotum í bókini, heldur enn at siga slíkt í einum lesarabrævi. Eg hevði verið nøgdur við nøkur fá brot úr Tingakrossi, tí eg eri vælviljaður yvir fyri projektinum at skriva um Kierkegaard á føroyskum, men ikki undir øllum umstøðum. Tað er heldur ikki tað, eg eg ikki trúgvi Ólavi, eg haldi hann vera ein skilafólk. Tað var ein fragd at hoyra hann tosa livandi og væl um Kierkegaard í sendingini Tilveru í heyst, men eg fasthaldi, at hetta ikki kann vera uppgávan hjá lesarinum at lesa alt tað, ið Ólavur ikki sigur hvar er at finna í bókini.

Taka vit hetta við Victor Danielsen, so sigur Ólavur, og her trúgvi eg honum, at Victor læs Kierkegaard, men so skjótt Ólavur hevur sagt tað, so hálar hann trúðvirði undan allari samanbering av Victori Danielsen og Søren Kierkegaard, so sum at Victor helt, at Gud førdi pennin, tá ið Bíblian var skrivað. Kierkegaard helt, at Bíblian varð skrivað av menniskjum. Soleiðis dekontruerar Ólavur sína egnu tesu, ið væl er gjørligt, og ikki nakað man sær so ofta í ritgerðum og bókum, men tá hann ikki brúkar keldur endar alt sum ein pástandur. Og her meini eg við orðinum "pástandur", ikki ein lygn, men bert nakað, ið ikki er sannførandi skjalprógva og tí enn ein óverifiseraða tesa.

Tá eg ikki var sannførdur, fór eg sjálvur at hugsa, at tað er væl møguligt, at Victor var ávirkaður av uppgerðini hjá Kierkegaard við kirkjuna, men hesir menn enda frá fyrsta degi sum dagur og nátt. Eg veit so mikið um Kierkegaard, at hann ikki bert var móti kirkjuni og prestunum, men sjálvt hugtakið um eina samkomu var fyri hann andstyggiligt, sjálvur tók hann til, tí hann var bangin fyri, at fólk hildu hann vera grundtvigianarara: " (…) Ingen, Ingen, Ingen her paa Berget er Bevægelsen saa fjern som jeg…. ( Pap. X 4 A, s. 53, Í: Bertelsen, 1996).

Tað kann gott vera, at Ólavur hevur haft sum ætlan, at fara gjøgnum (øll) tey mongu høvuðsverkini hjá Kierkegaard á sínum 191 síðum, men hetta eydnast illa, tí hann kemur ikki longur enn til fasurnar hjá Kierkegaard, og hetta er nú einaferð fyrst og fremst at lesa í verkinum "Enten Eller", ið bókin "Antin Ella" eitur eftir. Hetta er eisini hin besti parturin av bókini.

Hin vegin er tað tíverri ein sannroynd, at tað eru nógvir feilir í bókini, so sum søgan um P.L. Møller, ið endar sum ein ábending og ein hálvkvødd vísa. Vit at "googla" P.L. Møller kundi Ólavur lisið, at hann t.d. vann tvey gullmerki á Universitetinum og ikki eitt, hetta vildi bert tikið 20 sekund.

Ólavur fyriheldur seg ikki til nýggju granskingina, ið Peter Tuvad hevur givið okkum, ið fullkominliga broytir okkara hugmyndir av persóninum Kierkegaard. Og hann sigir einki um feillesingar av Kierkegaard, ið eg havi sæð í bókini. Eg haldi tí, at Ólavur skal gleðast, at eg av vælvilja gav honum tríggjar stjørnur í Kultura.

Eg vóni, at Ólavur skrivar fleiri bøkur um heimspeki og um Kierkegaard, har er nógv, ið vantar viðgerð og tulking enn, men næstu ferð skal hann avgerða um tað er ein lættlisin bók sum Johannes Møllehave skrivar tær, ella ein sum heldur longri, sum tær hjá Johannes Sløk, ið hann vil skriva.

**Kelda:**
Otto Bertelsen: Søren Kierkegaard og de første grundtvigianere. C.A. Reitzel, 1996.

# Nú vakni øll úr svøvni glað ...

**KARIN KJØLBRO**



Omanfyrinevndi var fyrsti sálmur til morgunandaktina í morgun. Beint áðrenn frættu vit í tíðindunum, at nú skuldi málið um tey trý uppsøgdu á Matrikkulstovuni leggjast fyri Løgtingsins Umboðsmann.

Ivist í, hvussu glað hesi trý eru fyri at vakna í morgun. Tað tykist ilt at fáa skil á hesum máli. Fólkini eru limir í Starvsmannafelagnum, og knappiliga kom ein tíðindastubbi um, at tey ikki vóru vard av almenna starvsfólkapolitikkinum. Harumframt tykist málið heimleyst og skal í býin til løgfrøðiliga meting. Hava vit í landinum starvsfólk, ið bera brek, ið eru undirgivin serligar og verri reglur enn hini, so snýr hetta mál seg eisini um mannarættindi.

Rúsdrekkapolitikkurin á almennum arbeiðsplássum er fyri øll – eisini tey, ið ikki drekka og sama er við roykipolitikkinum. Almennur starvsfólkapolitikkur er fyri øll í starvi, og eru undantaksreglur kann tað bert snúgva seg um onkran, ið skal hava sersømdir t.e. betri sømdir.

Hetta er ein frammaná til øll, ið hava til arbeiði og visjón at skapa fólki møguleika til sjálvi at lívbjarga sær og sínum, so tey hava nakað at fara upp til hvønn morgun. Tað er ikki til at skilja at amboðskassin á hesum øki framvegis ikki er nøktandi. Eisini hevur tú hug at spyrja, um øll, sum eru í starvi hjá landinum ikki hava eitt setanarbræv har á stendur, hvørjar treytir tey arbeiða undir. Hvar er rúmligi arbeiðsmarknaðurin?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.